TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Serstovan

Serstovan Inni á Gøtu er eitt nýtt dagstovnatilboð í Tórshavnar kommunu til børn, sum vegna brek ikki fáa gagnnýtt vanligu dagstovnatilboðini.
Hon er fyrst og fremst ætlað børnum undir skúlaaldri, sum eru fjølbrekað, og sum hava tørv á serligari stimbran og umsorgan í einum mennandi umhvørvi.
Serstovan húsast í góðum umstøðum í einum sethúsum Inni á Gøtu, har pláss verður fyri 6-7 børnum.
Samstarv verður við Býlingshúsið Inni á Gøtu.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

Endurlýsing!

# Fysioterapeutur og ergoterapeutur til nýggja serstovu

Vegna ov fáar umsóknir verður søkt av nýggjum eftir fysioterapeuti og ergoterapeuti til serstovuna Inni á Gøtu at byrja uml. 15. november 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Størvini**
Søkt verður eftir 1 fysioterapeuti og 1 ergoterapeuti at arbeiða umleið 30 tímar um vikuna hvør ella eftir nærri avtalu.
Størvini eru partur av einum tvørfakligum starvsfólkatoymi, har eisini pedagogar og sjúkrarøktarfrøðingur fara at starvast.

**Vit kunnu bjóða**
eitt áhugavert starv í nýggjum stovni, har tú sum partur av tvørfakliga toyminum verður við til at byggja upp eitt stimbrandi dagumhvørvi fyri børn við serligum tørvi.

**Førleikakrøv**
Vit ynskja, at umsøkjarin:
- hevur fysio- ella ergoterapeutiska útbúgving,
- hevur arbeitt við fjølbrekaðum børnum og innan sernámsfrøði,
- hevur hug og evni at skapa eitt trygt og stimbrandi umhvørvi, har dentur verður lagdur á at virða børn, foreldur og starvsfelagar,
- er búgvin, dugir at samstarva og er opin fyri menning í arbeiðinum,
- sær møguleikar heldur enn forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Størvini eru stuðulsfólkastørv og verða lønt sambært sáttmála millum Ergoterapeutfelagið ella Føroyskar Fysioterapeutar og Fíggjarmálaráðið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Jóhannu Olsen, leiðara á tlf. 25 57 87, Birgit Debess, leiðara í Stuðulsfólkaskipanini á tlf. 30 20 10 ella til Poulu Eidesgaard, dagstovnaleiðara á tlf. 31 77 01.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu vera Stuðulsfólkaskipanini í Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 21. oktober 2005.


# TILBOÐ

## Allar kavadraktir til børn verða seldar við stórum avsláttri

Toyskógvar -30%

Leikur -25%

Eisini eru fleiri onnur góð tilboð

Tilboðini er galdandi í viku 41 og 42

sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR
Handilin á kajuni í Hvalvík • Tel. 422 394
www.okheilsola.com · okhammer@post.olivant.fo

Visti tú ikki tað? Sosialurin

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

22 50 00



VIVA

Vikuskiftisvaktin hjá

SOSIALINUM & PORTALINUM

er at hitta alt vikuskiftið á

TELEFON 22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ